

*Hilmar hjá Dánjali saman við Herdis á teirra silvurbrúðleypsdegi*

Ebbe Mortensen og Jákup Suni Jacobsen.

Emmi Hansen og Thala Rókstein frá Hellunum taldu rationeringskortini, sum keypmenninir handaðu inn fyri at fáa meira sukur, te og aðrar vørur, sum vóru skamtaðar.

Restaði í noyddust teir niðan til amtmannin at "skrifta" fyri at fáa nøkur rationeringskort afturat. Orsøkin til manglandi kortini kundi vera, at kona handilsmannin hevði latið kundar fingið rationeraðar vørur uttan at taka rationeringskort frá teimum.

Umsitingin hjá landshandilin húsaðist í húsunum hjá Jacob Lützen á Áarvegnum.

## Kolonihavin nýggja lívið

Dánjal fekk eitt av teimum niðastu kolonihavastykkjunum, sum blivu útlutaði á Ternuryggi. Hetta kom honum væl við. Hann hevði alla sína tíð arbeitt við jørðini á Hvítanesi, og tað var ikki sørt, at hann saknaði hetta. Hann bygdi sær eini lítil hús her við tveimum rúmum. Komfýrur var, so hann altíð kundi kóka sær ein drekkamunn. Inga fekk sær rokkin niðan har. Tá ið Inga fór ein túr niðan til Dánjal, treiv hon stundum í karðarnar og fór eisini at spinna. Dánjal hevði ongan hug til at arbeiða við ullini. Men hetta dámdi hinvegin Ingu, og hon var eisini røsk at binda. Dánjal var ógvuliga fegin um at kunna velta og planta og aftaná arbeiðstíð lá ofta leiðin niðan har. Hetta bleiv honum ein sonn oasa.

Grannarnir hjá Dánjali vóru ógvuliga góðir við hann og hann við teir. Eystanfyri búði Åge, ein dani. Kona hansara var úr Klaksvík. Tá ið hon bakaði pannikøkur, setti hon Dánjali eitt krúss av kaffi og pannikøkur á grótgarðin, ið Åge hevði lagað millum teir, og tey vitjaðu eisini inn til hvønn annan. Tað var ein frøði fyri eygað at síggja, hvussu vakurt Åge hevði arbeitt sítt stykki. Har var tjørn, fleiri smá hús, trævøkstir og blómur. Ja, tað ber væl til at fáa tað at vaksa í Føroyum hjá teimum, sum duga snildirnar. Norðanfyri búðu Oluffa og Petur Bærentsen. Tey vóru ikki minni góðir vinir og bjóðaðu av og á Dánjal døgurða, eftir at hann var blivin einsamallur.

Eisini grannarnar á Abbatrøð hevði hann gott samskifti við. Her vil eg nevna Bette, konu Jákup á Lava. Hon bar ofta Dánjali døgurða inn, tá ið hon hevði gjørt sera góðan døgurða. Einaferð eg kom inn til hansara, hevði Bette júst verið inni við einum hálvum seyðarhøvdi við stórum leskiligum nakkaspiki.

Dánjal hevði mangan ringan farið, tey 40 árini, hann baldist á sjónum, men ringasta brotið møtti hann nokk, tá ið Inga í 1950 gjørdist sjúk av krabbameini. Hon fór niður á ríkissjúkrahúsið og fekk skurviðgerð, men hon stóð ikki til at bjarga. Hon doyði í 1952, bert 62 ára gomul. Hetta var okkum stórur missur. Eg haldi, at øll vóru góð við Ingu og høvdu stóra virðing fyri henni.

## Greiða støðu á fleiri økjum

Táið Dánjal og Inga vóru í góðum aldri tóku tey ímóti Jesusi sum frelsara sínum, nakað sum Dánjal ofta hevði á munni, og man hetta hava givið honum ta styrki, sum hann hevði brúk fyri. Inga varð jarðað frá Ebenezer, ið var teirra andaliga heim. Hetta var eisini okkum ein stórur missur. Ommubørnini elskaðu hana.

Ein abbasonur spurdi einaferð Dánjal: "Abbi, hava tygum ongantíð roykt?" "Jú, góði. Eg roykti, men táið eg 17 ára gamal eitt kvøldi kom upp á dekkið, hetta var við Carl og tað var dýrdarveður, og eg festi mær í pípuna, kom hesin tankin til mín: "Hetta verður tær bara til forderv. Tá tók eg og tveitti pípuna fyri borð og havi ikki roykt síðan."

Hetta vóru vísdómsorð, sum fleiri skuldu lagt sær í geyma. Hetta er eisini eitt gott dømi um ein mann við hugburði.

## Húsið sorað

Tíðina aftaná var Dánjal nógv í bátinum ella á Ternuryggi. So gingu árini. Hann fríðkaði um stykkið, velti og plantaði. Hann gjørdi sær ein ein hyl. Tað rann ein lítil løkur oman gjøgnum stykkið. Hann hevði nakrar dunnur í hylinum. Tær gjørdu sær reiður



*Hans Pauli, yngsti sonur Dánjal við konuni Petru, sum er systir Nenu*



*Flaggað varð á Suðurlandinum fyri Paulu, tá ið hon var fødd. Her saman við Peter, sum kom til Føroyar undir krígnum sum hermaður*



*Fýra ættarlið, tá ið fyrsti Hvítanes kom.* ***F.v.*** *Dánjal, Petur, Dánjal Pauli og Marni*




*Dánjal fekk kampingvogn at húsast í á Ternuryggi*

og vurpu í kjarrinum, sum vaks runt bakkan. Tá ið Dánjal bakaði sær pannukøkur, vóru eggini tøk.

Vit kunnu ætla, at tað hevur verið sum at toran slerdi niður, tá ið ein frá kommununi kemur niðan til hansara við boðunum, at húsið skuldi burtur, tí tað stóð í vegin fyri einum vegi, teir skulu gera niðan á Ternurygg. "Ja," sigur Dánjal, "eg vil ikki vera í vegin fyri nøkrum útviklingi, um tað ikki kann vera annarleiðis. Men kunnu tit gera mær tann beina, at tit taka húsið niður so hampiliga sum til ber, so eg kann brúka sperrur og tílíkt aftur, um eg byggi mær eini hús upp aftur.

Tað næsta hann frættir er boð um, at hann nú skuldi tøma húsið, tí tað skuldi burtur. Ein dagin Dánjal kom niðan, var húsið knasað sundur. Tað var ikki eitt heilt sprek eftir. Hegnið var rivið vekk og dunnurnar gingu fyri vág og vind. Tá var lítið um Dánjal. Hann hevði einki at kroka í ella at heita seg av, tá ið tað var kalt. Hann hevði nokk ikki væntað, at teir fóru so bondsliga fram. Teir vóru komnir við eini gravkúgv og tóku ein stóran triðing av stykkinum. Tað hevði verið sømiligari, um teir fluttu hegnið so langt inn, sum tað var neyðugt. Grannarnir harmaðust hann, og ógvaðust um hesa óvirðuligu framferð, honum hevði verið fyri. Tá helt okkurt av børnunum, um hann ikki átti at keypt sær ein kampingvogn, og tað bleiv eisini gjørt. Har vóru nógvir sum hjálptu til at fáa sett vognin inn á stykkið, har hann stóð best fyri. Nú var Dánjal so fyrndarglaður aftur.

Sum árini gingu, gjørdi hann minni við bátin, men jarðarstykkið á Ternuryggi var honum til stóra gleði.

Dánjal var komin langt upp í 90-ini, áðrenn hann gavst at fara niðan á Ternurygg, men abbabørnini vóru altíð klár at koyra hann niðan, tá ið hann hevði hug, og tey fóru eisini eftir honum um kvøldið. Hann var jú gamal kokkur, so hann kláraði væl at húsast einsamallur. Soleiðis vildi hann helst eisini hava tað.

Dóttirin hugdi til hansara og hugnaði um hann hvønn dag. Hann varð 95 ára gamal, tá hann varð innlagdur á Landssjúkrahúsið í tvær vikur. Tá funnu tey onga journal! Hetta var nevniliga fyrstu ferð hann kom á sjúkrahús. Tá vóru eyguni blivin so vánalig, at hann fór til ein av synunum at vera tey seinastu 2-3 árini. Hann doyði úti við 98 ára gamal eftir stutta sjúkralegu.

## Tøkk til Nenu

Hetta var so søgan um Dánjal av Hvítanesi, sum er ein góð lýsing av einum av teimum, sum løgdu grundina undir okkara samfelagi. Nena eigur stóra tøkk fyri, at hon hevur tryggjað, at henda frásøgn er og verður varðveitt.